## Ljósareyða sloyfan í SMS

Í oktober mánaði á hvørjum ári varpar Føroya Felag Móti Krabbameini ljós á bróstkrabba. Í ár byrjar átakið við einum tiltakið í SMS fríggjadagin 3. oktobur, tá kvinnur frá sjálvhjálparbólkinum Bót til Bata verða á torginum frá klokkan 13 til 19. Høvi verður at práta við kvinnurnar frá sjálvhjálparbólkinum hjá Føroya Felag Móti Krabbameini, og tær býta út upplýsandi tilfar um bróstkrabba og skriv við sjey góðum ráðum móti bróstkrabba.



## Gera fólk varug við bróstkrabba

Ljósareyða sloyfan er ímyndin í stríðnum móti bróstkrabba, og fríggjadagin ber eisini til at keypa bæði svarta T-shirt og svartar sokkar við sloyfu á. Endamálið við árliga átakinum móti bróstkrabba er at gera fólk varug við, at jú fyrr krabbamein i bróstinum verður viðgjørt, jú fleiri lív kunnu verða bjargað. Í Føroyum verður ein út av 10 kvinnum rakt av krabba í bróstunum. - Tú kanst hjálpa okkum í stríðnum móti hesi sjúku við eini peningaupphædd ella við at keypa blusur, sokkar ella eina ljósareyða sloyfu. Kvinnur mugu eisini kanna síni egnu bróst regluliga og spyr mammu tína, systir tína og vinkonurnar, um tær kanna bróstini regluliga. Jú skjótari sjúkan verður uppdagað, jú betri møguleikar eru fyri at gerast frísk aftur, sigur Føroya Felag móti Krabbameini.

# Uppsagnir lúra í Klaksvík



**Klaksvíkar kommuna er í álvarsomum fíggjarligum trupulleikum, og strong tiltøk verða sett í verk fyri at tálma útreiðslurnar beinanvegin. Tosað verður um at hækka skattaprosentið við tveimum prosentum, og virkandi borgarstjórin útilokar ikki, at fólk verða søgd úr starvi**



*Kristian Fríðrik Olsen, virkandi borgarstjóri*

KLAKSVÍKAR KOMMUNA

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Klaksvíkar kommuna hevur átrokandi tørv á gjaldføri fyri at svara sínum skyldum.

Kommunan hevur longu trupulleikar við at gjalda rokningar fyri vørur og tænastur, og um kommunan ikki fær nýggja fígging til raksturin, klárar kommunan ikki at gjalda lønir og lánsgjøld seinni í ár.

Tveir peningarstovnar hava sagt nei til at fíggja gjaldføristørvin hjá kommununi, men samráðingar eru nú við ein triðja peningastovn um fígging.

Klaksvíkar kommuna sendi í gjárkvøldið tíðindaskriv til fjølmiðlarnar, har boðað varð frá, at tiltøk beinanvegin verða sett í verk fyri at venda skeivu gongdini, og keldur, sum Sosialurin hevur tosað við, siga, at støðan er álvarsom og akutt.

### Gongur skjótt skeivan veg

Orsøkirnar til vánaligu fíggjarligu støðuna í Klaksvík er, at kommunan hevur brúkt nógvar pengar til íløgur og rakstur seinnu árini, og í fleiri samanhangandi ár hevur stórt hall verið á fíggjarætlanunum og ársroknskapum. Aftur í ár eru meira enn 20 milliónir í halli á fíggjarætlanini, og afturat tí halda inntøkumetingarnar ikki.

Roknað hevur verið við, at inntøkurnar hjá Klaksvíkar kommunu í hesum fíggjarárinum skuldu verða slakar 140 milliónir krónur, men seinasta metingin sigur, at inntøkurnar verða umleið 130 milliónir krónur.

Millum inntøkurnar, sum svíkja, eru skattainntøkurnar, inntøkurnar hjá Klaksvíkar Havn og inntøkur fyri grundstykkjasølu.

### Umhugsa munandi skattahækking

Fíggjarnevndin hjá Klaksvíkar kommunu hevur havt fíggjarligu støðuna til viðgerðar, og har er niðurstøðan, at strong tiltøk mugu setast í verk fyri at tálma útreiðslunum beinanvegin. Her og nú skal haldast aftur við útreiðslum á øllum økjum, og raksturin verður munandi skerdur næsta ár.

Tað er eisini greitt, at skattaprosentið í Klaksvíkar kommunu hækkar næsta ár, men enn er ikki gjørt av, hvussu nógv tað hækkar. Í fíggjarnevndini hevur verið tosað um, at hækka skattaprosentið við tveimum prosentum, men endaligu avgerðina í hesum máli eigur Klaksvíkar býráð.

### Útilokar ikki uppsagnir

Kristian Fríðrik Olsen, virkandi borgarstjóri, sigur, at Klaksvíkar kommuna nú tekur skjót og ítøkilig stig fyri at venda skeivu gongdini, og fíggjarnevndin hevur eisini lagt eina ætlan fyri næsta fíggjarár.

- Stórt trýst er á gjaldførið hjá Klaksvíkar kommunu, og tí skulu vit gera nakað fyri sjálvi at venda gongdini. Ballið er búið. Klaksvíkar kommuna kann ikki framhaldandi verða veitari av so nógvum tænastum á so nógvum økjum, sum vit hava verið, sigur hann.

Virkandi borgarstjóri í Klaksvík útilokar ikki, at tað verða uppsagnir í kommununi.

- Tað verða í øllum førum umleggingar. Eg ætli mær ikki at skapa nakra ræðslu av nøkrum slag, men eg vil heldur ikku útiloka nakað. Vit hava longu havt starvsfólk hjá okkum inni, og tað, sum vit koma at gera, gera vit í tøttum samstarvi við okkara deildir, sigur Kristian Fríðrik Olsen.